**ER NAKAR**
Soldier of Fortune Gold Edition 500 kr. til sølu ella umbýti til Playstation II. Er nakar, sum vil býta um við eitt annað Playstation II spæl?
*Tlf. 448097*

**TELDA**
Telda 1 ára gomul. DELL Dimension 8100 1,5 GHz, 128 MB DDR Ram, 20 Gb harddisk. Øll hent forrit – garanti. Boð undir 10.000 ongan áhuga.
*Tlf. 224454 eftir kl. 17.30*

**TELDA TIL SØLU**
AMD Duron 1200 MHz CPU, 512 MB SD-Ram, 80 GB Haddisk, Riva TNT2 M64 32MB, DVD-drev, Brennari, Onboard ljóðkort, 10/100Mbit PCI Netkort, Modem, Floppy drev, Háttalarasett, Knappaborð, Scroll mús, við eru nógv program, spøl, filmar, so sum win-xp, office xp, warcraft 3, championship manager, soldier of fortune 2, We were soldiers, Star wars 2, The lords of the rings og annað. Til sølu fyri 9.000 kr. Uttan skerm.
*Tlf. 32876726*

**Til sølu**
Pentium 4, 2.0 GHz, 120 GB Hard disk, DVD, brennari, net-kort, 128 grafik-kort 64, 512 DDR-Ram og mangt annað. Til sølu fyri 14.000 kr.
*Tlf. 424257*

## Tónleikur

**TIL SØLU**
Ein guitar-forsterkari av merkinum Tanglewood til sølu fyri 1.000 kr. Bert hálvt ára gamal (nýprísur 2.500 kr.)
*Tlf. 448467 aftaná kl. 1.800*

**TIL SØLU**
Yamaha tvørfloyta, sum nýggj, til sølu fyri 4.000 kr. Ring
*Tlf. 321448/228148*

**HYGGA SÍGGJ**
Ein Pioneer forsterkari 2 x 100w, Ein Pioneer CD-spælari og 2 JBL 150w hátalarar fyri bert 4000 kr.
*Tlf. 220284*

**HOLFI**
Intigera forsterkari - kr. 19.999. CD x Aurus - kr. 22.000. www.holfi.dk - Nú kr. 27.000
*Tlf. 424257*

**LP-PLÁTUR**
Er tað nakar, ið hevur áhuga í LP-plátum? Vit hava nakrar plátur frá 70- og 80-unum. Mest gospeltónleik og nakað av klassiskum tónleiki.
*Tlf. 310580*

**HYGG HER!!!**
Trummusett til sølu fyri 3.500 kr. Trummusettið er av slagnum Honer. Nærri fæst at vita á:
*Tlf. 265262, Brian Aron*

**KLAVER YNSKIST TIL KEYPS**
Hevur nakar eitt brúkt, helst gamaldags, klaver í góðum standi til sølu,
*vinarliga ringið til 320300*

**TIL SØLU**
Orgul sera bíliga til sølu.
*Tlf. 214788, í Fuglafirði*

**TIL SØLU**
Tandberg Radio, typa Huldra 10.
*Tlf. 218778*

**Til sølu**
Luxman LV1030.(rørforsterkari) Sony CDx202ES. Sony Minidisk - MDS-Je500. Kenwood GE7030. Yamaha band KX-W602RS. Prísur: 9.000.kr
*Tlf. 424257*

## Út- & Sjónvarp

**SONY-HJEMMEBIOGRAF SÆLGES**
41" projektions-TV med digitalt makfilter, massevis af egenskaber. Digital Sinema Sound forstærker med surround effekt 5x100w. DVD-afspiller, precision Drive til CD-/CD-R afspilning. Pascal Satellit-højtalere: Frekvensområde incl. Subsoofer op til 40 KHz, 2 front, 2 bag og 1 centerhøjtaler. Subwoofer's udgangseffekt 120w. Sælges samlet eller TV alene! Alt sølvgråt, kun 8 mdr. gammelt. Ring og hør/se nærmere.
*Tlf. 216804*

**SJÓNVARP**
og videomaskina ynskist til keyps.
*Tlf. 260334*

## Ymiskt

**TIL SØLU**
Stoypijarnsketil til oljufýr/fast brenni til sølu. Anhangskrókur til Mazda 323 (nýggja modelli) til sølu.
*Tlf. 315072 ella 264334*

**LOPPUMARKNAÐUR**
Tikið veðrur ímóti lutum til loppumarknaðin 31. aug. hvønn dag millum kl. 18-19 í Longbrá. Um tað eru størri ting kunnu tit ringja og vit avheinta tað. Geir, tlf. 217655, Óli, tlf. 220834
*Stjørnan*

**SIEMENS C25 YNSKIST**
Er tað nakar sum hevur eina gamla Siemens C25 fartelef., sum eg kann keypa fyri ein bíliga penga. Battaríið á telef. nýtist ikki at fylgja við ella rigga - bara telefonin sjálv er ok. Ladari nýtist heldur ikki. Ringi
*tlf. 250118/310286*

**TIL SØLU**
SONY-Fløguspælari við 18 BIT Digital Filter, fyri 1000 kr.
*Tlf. 265189 eftir kl. 15.*

**TIL SØLU**
Nokia 3330 við uppladara til sølu fyri 850 kr.
*Tlf. 315885*

**DYKKARAÚTGERÐ**
Komplett dykkaraútgerð til sølu. Turrdrakt stødd XL, við vesti, lungaautomat, fløskum, brillum og fitjum, til sølu fyri kr. 12.000,-
*Tel: 210860*

**FARTELEFON TIL SØLU**
Fartelefon, Nokia 5510, 3 mðr. gomul. Prísur: 1.000 kr.
*Tlf. 263221, Jacob*

**HURÐAR**
4 hurðar 0,95m x 2,5m. Væl egnaðar til úthús, til sølu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 423290*

**VÁTDRAKT**
í góðum standi, meðalstødd, ynskist.
*Tlf. 264864*

**EIGUR NAKAR**
eina bommautomat at selja mær. Vinarliga ring millum kl. 12-13 og aftaná kl. 19.
*Tlf. 311683*

**YMISKT TIL SØLU**
Nýggjur plenuklippari til sølu fyri 1.000 kr. Damusúkkla 100 kr. Nakrar brúktar zinkplátur 100 kr.
*Tlf. 312722*

**MÁLNINGUR TIL SØLU**
Málningur av Sørvági, stødd 70 x 80 cm. til sølu.
*Tlf. 319242*

**VIDEOUPPTAKARI**
góður, lítið brúktur videoupptakari til sølu fyri 3.000 kr.
*Tlf. 266894*

**GRAS**
Manglar onkrum gras, so ring á
*tlf. 422243 ella 422178*

**SOLARIUM TIL SØLU**
Solarium við 28 rørum og andlitssól bíliga til sølu. Vinarliga ringið á
*tlf. 266443*

**ÚTHURÐ TIL SØLU**
Ein nýggj úthurð – altan/terassu – við sprossarútum 110 cm. br. 200 cm høg, til sølu.
*Tlf. 311612*

# Skrivstovufólk

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Akfaraskránna til setan so skjótt sum gjørligt. Talan er um eitt tíðaravmarkað starv, ið er skipað sum eitt 1/2 ársverk.

**Uppgávur:**
Landsstýrismaðurin í Vinnumálum fer ætlandi í næstum at áseta, at øll prutl skulu skrásetast. Í hesum sambandi verður søkt eftir fólki til hesa uppgávu. Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðsla av viðskiftafólki
- Framleiðslu og útflyggjan av nummarspjøldrum
- Eftirkanning av kravdum skjølum
- Kunning av viðskiftafólki um átakið

**Førleikakrøv:**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir og at viðkomandi er fyrikomandi. Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

**Setanartreytir:**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetananin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umfrant Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráðir.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til tlf. 350400 og tosað við Jákup Jacobsen, stjóra. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 9. september 2002.

**BILEFTIRLIT FØROYA**
**Hoyvíksvegur 57**
**Postsmoga 3206**
**FO-110 Tórshavn**

*Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kunningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólko koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskrásetingina og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Bileftirlitið sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 18 fólk.*

# Kunngerð

Kunngerð um broyting av Býarplaninum og Byggisamtyktini fyri Skála Kommunu.

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 seinast broytt 13. mai 1997, verður við hesum boða frá, at Bygdaráðið á fundi 27.06.2002 og 09.07.2002 hevur samtykt at endurskoða Býarplanin og Almennu byggisamtyktina fyri Skála Kommunu og umfatar Býarplanurin og Almenna byggisamtyktin allar eigindómar.

Broytingarnar í Býarplaninum og Almennu byggisamtyktini eru til skjals á Kommunuskrivstovuni í avgreiðslutíðini frá 29.08.2002 til og við 19.09.2002.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu verða bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi 29.11.2001.

Skáli 27.08.2002

**Skála Kommuna**




**REOLIR**
**Hædd 2-3 m**

*Hillar:*
*30 x 90 cm*
*45 x 90 cm*
*60 x 90 cm*
*75 x 90 cm*
*90 x 90 cm*

*Til tey størri goymslurúm bjóða vit stigar og bjálkar til europlattar*

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2806, Sp/f Djúphav, 370 Miðvágur.

Viðtøkur broyttar:
26.06.2002.
Kapitalur:
Hækking við kr. 30.000,00 til kr. 120.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 30.000,00 við skuldarumskifti til kurs 50.000Flokkur A: kr. 20.000,00 til kurs 50.000 og Flokkur B: kr. 10.000,00 til kurs 50.000
Flokkar: A: kr. 80.000,00 og B: kr. 40.000,00

Skráseting Føroya tann 22. august 2002

Kristin Balle








# HEILSANIR



**Petrina Berg, Hvalba**
Til bestu langommu í verðini. Hjartaliga tillukku við 91 ára føðingardegnum, hvør skuldi trúð tí.
**Nógvar mussar frá okkum 39 langommubørnunum og 1. oldurommubarninum**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 50 ára føðingardegnum tann 30. juli. Takk fyri at tú ert so góð við meg. Betur seint enn ongantíð.
**Heilsan Eyðun Fríði**



**Góða elskaða Beinta**
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum í dag.
**Ynskja omma og abbi á Dalatrøð**



**Allarbesta Beinta**
Gumma ynskir tær hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum í dag. Gleði meg til tú kemur til Danmarkar.
**Kærar heilsanir Sólvágumma**



Hjartaliga takka vit øllum sum gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 27. juli 2002.
**Rakul og Michael**



**Petrina Berg, Hvalba**
Til okkara høgt elskaðu mammu, hjartaliga tillukku við føðingardegnum í dag, má Harrin signa framtíð tína. Nógvar mussar frá okkum.
**Børnini**



**Petrina Berg, Hvalba**
Góða omma. Ja, nú fyllir tú longu aftur, hjartaliga tillukku við degnum. Her er bert ein partur av okkum, men øll 18 lata heilsa.
**Ynskja øll ommubørnini**



**Góði elskaði Heðin!**
Lukku og gleði á tínum 2 ára degi 28. august. Alt tað besta.
**Ynskja mamma, babba, Dánial og Magnus**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga fyri gávur og vitjan á fermingardegi mínum 24. mars.
**Karis Hansen, Hósvík**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mið-degi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ....................................................................
Bústaður: ..............................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«